

## Nuuk 127 mió í halli

Býráðið í Nuuk hevur samtykt, at skattaprosentið í kommununi verður 25 næsta ár og sostatt tað sama sum í ár. Saman við 11 prosentum í landsskatti og 6 prosentum í felags kommunuskatti koma borgararnir í Nuuk at gjalda 42 prosent í skatti næsta ár, sum er tað sama sum í ár. Tað ber samstundis í sær, at kommunan fer at hava 127 mió. krónur í halli á fíggjarætlanini fyri 2008, tí treðislurnar verða 997 mió. krónur og inntøkurnar 870 mió. krónur.

# Nólsoyarskipið fær skap

**Á kunnandi fundi í Nólsoy í síðstu viku vóru fyrstu skitsurnar av nýggju Rituni vístar bygdarfólkinum**

NÓLSOYARSKIP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er ikki beinleiðis vakurt, nýggja Nólsoyarskipið. Men nýggju og herdu treytirnar gera, at ferjur í dag líkjast meiri kubbum heldur enn skipum.

Strandferðslan leggur dent á, at talan er um skitsur, og ikki neyðturviliga endaligu tekningarnar.

Upplýst var, at eitt slíkt skip helst skal vera undir 40 metrar langt, men kortini ber til at leingja tað um neyðugt seinni.

Somuleiðis ber til at innrætta salongir eftir egnum tykki, og tað kann gerast bæði bið komforti ella við flest møguligum sitiplássum.

Nólsoyingar vóru sum heild væl nøgdir við kunningina, eisini tí alt bendir á, at nýggja skipið verður eins álítandi sum verandi Rita, men bara nógv meiri tíðarhóskandi.



*Uttan er nýggja Nólsoyarferjan ikki beinleiðis vøkur á at líta*




*Fleiri møguleikar eru at innrætta salongina, antin mann ynskir komfort ella so nógv sitipláss sum gjørligt*

# Grannar vilja steðga bygging

**Fólk uppi á Óðinshædd eru ónøgd við ta bygging, sum er og verður framd í grannalagnum, Tí hava tey sent eina kæru til býráðið hesum viðvíkjandi**

BYGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fólk í grannalagnum uppi á Óðinshædd eru alt annað enn fegin um, at fleri fyritøkur hava fingið og fara at fáa byggiloyvi til skrivstovubygningar í økinum.

Fólk, sum Sosialurin hevur tosað við, siga, húsavirðini fara at lækka munandi, tá eini 150 fólk fara at koyra til og frá arbeiði í økinum. Og hetta ætla tey at gera naka við.

Tey hava tí vent sær til ein sakførara, sum hevur sent Tórshavnar kommunu eina kæru, har byggingin verður mótmælt. Ikki bara nógva ferðslan, sum kemur í økinum, órógvar. Eisini útsýnið yvir Nólsoyarfjørð verður tikið burtur við ógvuliga høgu bygningunum, eru grannarnir á Óðinshædd ræddir fyri.

Av býráðnum verður váttað, at har er ein kæra komin, men hon er eftir hvat skilst ikki viðgjørd enn. Annars verður sagt, at broytingarnar í byggisamtyktini fóru fram í 1999, tá serstaka og almenna byggisamtyktin varð broytt. Og so vítt teir kundu siga upp á standandi fót, vóru eingi mótmæli móti broytingunum.

Upp á fyrispurning um fleiri byggiloyvir vórðu latin á Óðinshædd varð sagt, at tað eru útstykkjað fimm grundstykir har uppi, og øll eru seld.

So roknast má við, at bygging fer fram á hesum stykkjum í nærmastu framtíð, verður upplýst av býráðnum.



*Formula er fyrsta fyritøkan, sum byggir á Óðinshædd niðanfyri vegin*

Mynd: Jens Kristian Vang